

Valhall-boripallurin hjá BP. Mynd: BP

# Aker Solutions fekk risaavtalu frá BP

**Jógvan Hugo Gardar**

26.11.2015 - 11:16

Oljan.fo

Frálandafyritøkan Aker Solutions boðar í morgun frá at tey hava fingið eina fimm-ára viðlíkahaldsavtalu við oljufelagið BP. Talan er um viðlíkahald og tillagingar á boripallunum sum BP hevur á norska landgrunninum.

Avtalan verður sett í verk 1. desember, tá tann gamla avtalan millum partarnar gongur út. Virði á avtaluni er í mesta lagið 3,2 milliardir norskar krónur. Avtalan er í fyrstu atløgu fyri fimm ár, men kann leingjast við fýra árum.

Per Harald Kongelf, stjóri fyri Akers Solutions í Noregi, sigur í børsfráboðanini at talan er um eina avtalu sum Aker Solutions hevur vunnið í kapping við fleiri stórar altjóða útbjóðarar av somu tænastum.

- Avtalan tryggjar nógv størv framvið norsku strondini, og gevur okkum møguleika at menna okkara virksemi longur norður, sigur Kongelf.